TING-HELLAN

álvstýrisflokkurin
andi valskipan

Vilja hesir leggjast saman við ávíkavist Norðurstreym og Suðuroynna?

rættvísari í mun til atkvøðutal. Uppskotið ger tó tað, at talan í veruleikanum er um at taka av tvey valdømir, sum verða koyrd upp í onnur. Hetta fær uttan iva harða mótstøðu í hesum økjum, men her hevur Sjálvstýrisflokkurin heldur ikki nógv at missa. Seinastu valini hevur flokkurin verið langt frá at fáa umboðan í hesum valdømum, og heldur ikki er hann sterkur í valdømunum hesi skulu leggjast saman við sambart uppskotinum. Hinvegin so er talan um at leggja tvey tey minstu valdømini saman við granna valdømunum, sum av tilvild eisini eru ávíkavist trið- og fjórðminstu. Vága og Sandoyar valdømi eru yvirumboðaði og hava tí sína rødd at mótmæla hesum broytingum.

Rættvísari býti

Samanum tikið er endamálið við hesum uppskoti, at gera býtið av løgtingslimum rættvísari í mun til atkvøðutal, soleiðis er talan um eina betring av verandi skipan. Tað sum kann elva til mótstøðu er helst, at valdømini skulu broytast. Uppskotið er eisini komið, tí enn er einki komið frá Landsstýrinum, hóast at arbeiðast skal við hesum málið. Sjálvstýrisflokkurin megnar tí á henda hátt at fáa málið upp politiskt. Og tað er ein frøi at síggja, at flokkur, enntá bert við einum løgtingslimi og sum ikki er við í Landsstýrinum, megnar at finna orkuna til at koma við einum uppskoti um vallóg og/ella skipan.

Kommunur og valdømir

Tað hevði verið ynskiligt um ein broyting av valdømum og møguliga skipan, eisini tók atlit til aðrar broytingar. T.d er talið av kommunum minkað munandi og skal kanska skerjast við 2/3 afturat, m.a. fyri at kommunurnar kunnu átaka sær meira lokalpolitik. Í Sundalagnum fevnir nýggja kommunan tvørtur um valdømir. Tí kann spurningur eisini setast við, um at tað er eitt náttúrligt býti í valdømir har. Ynski at hava valdømir, er eitt ynski um at tryggja at allir partar av landinum eru umboðir og tí kundi ein hugsað sær, at eindir sum av egnum vilja hava funnið saman í samstarv, eisini ynsktu sær at verða saman í valdømi. Tað er sjálvandi truplari at fara í holt við at broyta valdømir, men ikki ein ómøgulig uppgáva.

Samanseta loysnir

Sjálvstýrisflokkurin nevnir, at eitt valdømi er ein loysn, men at tað neyvan er politiskur vilji fyri, og tí verður ikki arbeitt meira við tí. Tað er skilligt at løgtingsmaðurin hevur tað áskoðan. Men tað ber til at arbeiða við millumloysnum, t.d at samantvinna tað. Ein møguleiki er at varveita núverðandi sjey valdømini, men at bert eitt umboð skal veljast úr hvørjum valdømi og hini løgtingsumboðini verða vald í einum landsvaldømi. Møguleikarnir eru nógvir, tá talan er um valskipanir, men mest umráðandi er at vísa á hvørja politiska skipan vit ynskja, og síðan finna fram til tað valskipan sum nøktar tí tørvi. Í hesi tilgongd fara flokkarnir altíð at royna at tala fyri broytinguum sum væntast kann tæna teirra flokki, soleiðis er tað ikki bert í Føroyum, men kring allan heim.

Sosialurin
Sosialurin
i

O>P J RPPBK # T BFEB
Statsautoriserađ grannskođararfelag P/F
An associated firm of PricewaterhouseCoopers

Phofspqlsrc Ėih, ?Ėhe^ia^of

Vegna P/F Farex, T·rshavn, sßkja vit eftir einum b·khaldara at byrja skj·tast gjßrligt. Fyribils er arbeiđi ² umleiđ eitt §r fram.

Starviđ
Starviđ umfatar m.a. hesi ßki:
- at hava alt vanligt b·khaldsarbeiđi um hendi
- at hava §byrgdina av at b·khaldiđ alt²đ er ajour
- at gera kvartalsligar MVG-uppgerđir
- at hava dagliga rßkt og avstemming av debitorum og kreditorum
- at hava dagliga rßkt og avstemming av peninga stovni felagsins
- avskipingar
- vanligt skrivstovuarbeiđi annars, herundir telefonavgreiđslu

Starviđ umfatar b·khald og fyrisiting fyri bÞđi fßroysk og ¼tlendsk felßg ² samtakinum.

Fßrleiki
Tann, iđ setast skal ² starviđ, m§ hava g·đan kunnleika til b·khald og roknskap, og vera fßrur fyri at arbeiđa sj§lvstßđugt. Praktiskar royndir eru t² ein treyt.

TÞr verđur bj·đađ
Eitt avbj·đandi starv viđ einari lßn, sum samsvarar fßrleika t²num og praktiskum royndum.

Starviđ skal setast skj·tast gjßrligt.

Ums·knin
Allar ums·knir verđa viđgjßrdar ² tr¼nađi og skulu verđa okkum ² hendi ² seinasta lagi 7. oktober 2005. NÞrri upplÎsingar um starviđ fßast viđ at venda sÞr til okkum og tosa viđ Hans Laks§.

RASMUSSEN & WEIHE
STATSAUT. GRANNSKOĥARAFELAG P/F
P.O.BOKS 30
FO-110 T·rshavn
Faroe Islands

Ć Glađsheyggi
Tel (+298) 35 17 00
Fax (+298) 35 17 01
e-mail:rasmussen@rasmussen.fo
http://www.rasmussen.fo